## LED - nýggj ljósteknologi til bilar

**Seinasta nýggja innan billyktir eru LED-lyktir ella dioduljós, sum lýsa eins væl og xenon-lyktirnar. LED-lyktirnar eru longu at finna sum bak- og bremsuljós og verða væntandi góðkendar sum høvuðsljós um góð tvey ár**

BILLYKTIR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bil-lyktirnar verða alsamt betri og meira framkomnar. Tað eru ikki so nógv ár síðan bilarnir nýttu vanligar perur. Síðan komu halogenlyktirnar, sum lýstu fleiri ferðir so gott, og seinnu árini eru fleiri og fleiri bilar komnir við xenonlyktunum, sum næstan gera nátt til dag.

Seinasta nýggja innan lyktir er LED-lyktir ella dioduljós, sum lýsa eins gott og xenon -lyktirnar. Tað er týska el-fyritøkan Hella, sum framleiðir LED-lyktirnar, og tær verða í løtuni royndarkoyrdar sum forlyktir á bilmerkjunum: VW, BMW og Mercedes-Benz.

LED-lyktirnar eru longu at finna sum bak- og bremsuljós á t.d. nýggju VW Golf og Passat. Lyktirnar eru ikki enn góðkendar sum høvuðsljós, men tað verða tær væntandi síðst í 2007 ella fyrst í 2008.

Fyrimunirnir við LED-lyktunum er, umframt at tær lýsa sera gott, at tær halda líka so leingi sum bilurin, og at tá tær verða hópframleiddar, verða tær eftir ætlan væl bíligari enn bæði halogen- og xenon-lyktirnar.





*Bugatti Veyron EB 16.4 við meira enn 1.000 hestakreftum. Toppferðin er yvir 400 km/t, og bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 2.9 sekund*

Bugatti Veyron EB 16.4:

# Yvir 1000 hk og 30 milliónir krónur

**VW-konsernin er í ferð við at leggja síðstu hond á ein av heimsins skjótastu bilum, Bugatti Veyron EB 16.4 við meira enn 1.000 hestakreftum. Toppferðin er yvir 400 km/t, og bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 2.9 sekund**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bugatti Veyron EB 16.4 er ikki nøkur nýggjheit. Arbeitt hevur verið við hesum bili í umleið fimm ár, og hann hevur verið sýndur fram á fleiri altjóða bilaframsýningum.

Nú er verkætlanin komin so langt, at fyrstu bilarnir kunnu latast av verksmiðjuni í Alsace í Fraklandi seinni í ár.

Bugatti er eitt gamalt bilmerki, ið er kent frá ymiskum kappkoyringum fyrra partin av síðstu øld.

VW-konsernin eigur Bugatti í dag, og teir hava sett sær sum mál at gera ein av heimsins skjótastu bilum við yvir 1.000 hestkreftum. Bugatti Veyron EB 16.4 er eitt eindømi í søguni. Motorurin hevur 16 sylindarar og koyrir frá 0-100 km/t upp á 2,9 sek. og frá 0-300 km/t upp á minni enn 14 sek. Talan er um ein 8,0 litur W16 motor, t.v.s. tveir samanbygdir V8 motorar. Ventilarnir eru 64 í tali, og ikki minni enn fýra turboløðarar eru til taks.

Tað er ikki bara at koma upp í ferð, bilurin skal eisini kunna steðga aftur. Hetta setur stór krøv til bremsurnar. Bremsuskipanin er tann mest framkomna innan altjóða motorsportin. Ventileraðu karbon-bremsuskivurnar hava 8 stempul hvør, og tær kølast sera skjótt av. Samstundis hjálpir spoilarin aftan til við at bremsa bilinum. Um bilførarin skal bremsa skjótt, rættar spoilari seg upp - eins og á einum flogfari.

Pláss er einans til tvey fólk í bilinum, sum í dýrastu útgávuni kostar umleið 30 milliónir krónur.



*Bugatti Veyron EB 16.4 er 447 cm langur, 2 metrar breiður og 1,2 m høgur. Spoilarin aftan er við til at bremsa bilinum, eins og á einum flogfari*

VDO Dayton:

# Navigatiónskipan sæð í bakkspeglinum

**Tað er skjótt eingi mark fyri hvar navigatiósskipanirnar í nýggjastu bilunum eru at finna. Seinasta nýggja frá VDO Dayton er ein navigatiónsskipan, sum er innbygd í bakkspeglið**



BILÚTGERÐ
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Informatiónir frá nýggjastu VDO Dayton navigatiónsskipanini eru nú eisini at finna í bakkpeglinum við einum" TFT litskermi, ið vísir kort, koyriinstruktiónir og navigatiónsdata.

Bakkspeglið hevur innbygdar hátalarar, har ein týðulig rødd sigur frá tí, sum er á skerminum. Tá navigatiónsskermurin er sløktur, er speglið eins og eitt vanligt bakkispegl.